## Maddie-skjøl almenn



Frágreiðingar við túsundtals síðum við teorium um, hvussu tann nú fimm ára gamla enska gentan, Madeleine McCann, kann verða horvin, verður í dag almannakunngjørt av portugisisku løgregluni, sum hevur kannað málið. Maddie hvarv í mai mánað 2007 frá frítíðarstaðnum Praya de Luz í Portugal, og hóast mong spor eru kannað, er gentan framvegis ikki komin aftur í aftur. Mett verður, at frágreiðingarnar telja upp móti 20.000 síðum, so starvfólk hjá almenna ákæranum í Algarve fær úr at gera, tí tað eru tey, sum skulu fjølrita skjølini til journalistar, sum hava biðið um innlit í málið.

## Foreldur gloymdu barn

- Tit hava gloymt barn tykkara eftir í floghavnini. Tað vóru boðini, eini hjún fingu umborð á flogfarinum. Familjan var í seinna lagi til flogfarið og skundaði sær gjøgnum altjóða floghavnina í Tel Aviv, Ben Gurion, fyri at náa flogfarið. Í skundinum fingu tey teirra 18 kuffertir, taxfree innkeypið og fýra av teimum fimm børnunum. Seinasta barnið, ein tríára gomul genta, gloymdu tey eftir í floghavnini. Har fann ein løgreglumaður grátandi barnið, sum gekk og rópti eftir mammu síni. Foreldrini uppdagaðu einki fyrr enn flogternur søgdu teimum, at tey høvdu gloymt gentuna.

# ón og viti



*Umboðsnevndarlimir hjá Meginfelag Útróðrarmanna havt sett seg til borðs, og bíðað verður eftir seinastu umboðunum, áðrenn fundurin verður settur. Hetta er fyrsti umboðsnevndarfundur hjá Auðunn Konráðsson, sum hevur verið formaður í MÚ seinastu sjey árini*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

ella minni, leggur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna dent á.

Tað er heldur ikki fallið í góða jørð millum útróðrarmenn, at ætlan landsstýrisins eisini er at taka burtur minstaforvinningin, sum er galdandi fyri útróðrarflotan.

- Lítið er at ivast í, at hetta bara er byrjanin. Tað næsta verður, at lagt verður eftir minstulønini hjá fiskimonnum annars, sigur Auðunn.

Hann vísir á, at fiski-og útróðrarmenn eisini hava sínar skyldur at røkja – eins og aðrir borgarar í samfelagnum.

– Vit hava ikki havt stórvegis brúk fyri minstaforvinninginum í longri tíð, men hetta er ein trygd, tá tað gongur ringast. Sama er við minstulønini hjá fiskimonnum annars, sigur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna, Auðunn Konráðsson.



*– Tilmælið hjá landsstýrinum um fiskidagar fyri komandi fiskiár er ein katastrofa, sigur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna, Auðunn Konráðsson*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Landsstýrið útruddar útróður

**- Nú løgtingið í morgin fer at viðgera fiskidagar fyri komandi fiskiár, bendir mangt á, at ætlanin hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum er at taka grundarlagið undan allari fiskivinnuni, bæði á sjógvi og landi, sigur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna, Auðunn Konráðsson**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Klokkan 10 í morgun kom umboðsnevndin hjá Meginfelag Útróðrarmanna saman á fundi í Nólsoyarstovu í Havn at røða um støðuna, nú løgtingið í morgin fer at viðgera uppskot landsstýrisins um fiskidagar fyri komandi fiskiár.

Øll limafeløg hjá Meginfelag Útróðrarmanna kring landið hava sítt umboð í umboðsnevndini, og hesi eru eini 10-12 í tali.

Í tí dagliga er tað starvsnevndin í MÚ, sum tekur sær av felagsuppgávunum, og formaður í starvsnevndini er Auðunn Konráðsson, ið er virkin útróðrarmaður umborð á útróðrarbátinum Kallanesi, sum fiskar í bólki 4.

### Politiskur ágangur

- Tað er ikki vanligt, at umboðsnevndin verður kallað saman, men vit halda, at hetta er neyðugt, nú politisku ætlaninar eru vorðnar ótolandi fyri fiskivinnuna. Vit fara at røða um, hvat kann gerast, og tað er ikki óhugsandi, at vit fara at seta tiltøk í verk.

Auðunn heldur ikki, at útróðrarfeløgini kunnu sita hendur í favn, nú politiski ágangurin móti teirra lívsgrundarlagi er vorðin so stórur.

- Nú løgtingið í morgin fer at viðgera fiskidagar fyri komandi fiskiár, bendir mangt á, at ætlanin hjá landsstýrismanninum er at taka grundarlagið undan allari fiskivinnuni, bæði á sjógvi og landi.

Hann sigur, at tilmælið hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Tórbjørn Jacobsen, eins og signalini hjá samgongini, sum eru komin undan kavi, eitt nú í løgmansrøðuni á ólavsøku, eru ein katastrofa fyri alla fiskivinnuna.

- Verður uppskotið hjá landsstýrinum um ætlaðu skerjingarnar í fiskidøgunum samtykt, kemur tað at merkja, at 90% av húkaflotanum fer av knóranum.

### Ikki bert dagar

Auðunn Konráðsson vísir á, at í fylgiskjølum til løgmansrøðuna verður eisini nevnt, at minstiforvinningurin við tíðini – og soleiðis helst eisini minstalønin – kemur at fella burtur.

- Við smáum stavum verður skrivað um liberalisering og um, at vinnan skal byggja á marknaðartreytir, leggur hann aftrat.

Formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna sigur, at sum eitt »plástur« á sárið ætlar landsstýrið eftir øllum at døma at taka burtur avmarkingarnar fyri landingum uttanlands.

– Ætlaða skerjingin í fiskidøgum fer at gera tað ómøguligt at reka skip og bátar, samstundis sum fiskavirkini fara at liggja í fiskaloysi. Vit duga tí ikki at síggja hetta øðrvísi enn, at landsstýrið ætlar at útrudda alla fiskivinnu í Føroyum, bæði á sjógvi og landi, sigur Auðunn Konráðsson.

### Væl møttur

Umboðsnevndarfundurin hjá MÚ, sum byrjaði klokkan 10 í morgun, var væl møttur.

Hóast hetta er feriutíð, vóru flestu umboðini kring landið møtt og tey, ið ikki høvdu møguleikan at verða við, vóru frammanundan kunnaði um fundin og fóru somuleiðis at fáa ta kunning eftir fundin, sum neyðug er fyri, at alt meginfelagið kann standa saman um tær niðurstøður, sum væntandi verða gjørdar á fundinum.